# Vantandi friðartingingar í Miðeystri

## – ein lýsing av palestinsku sjálvstýrismyndugleikunum



*Hermaður hyggur at skaðunum í bygninginum hjá palestinska innlendismálaráðnum eftir bumbuálop frá ísraelska stríðsflogførum*

Eftir at valevnini hjá Hamas vórðu vald í palestinska tjóðartingið, hevur ruðuleiki valdað í økinum. Og trupult er at siga, hvør hevur valdið í palestinsku økjunum

SAMTÍÐARGREIN

*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

PLO, frælsisfylkingin fyri Palestina, varð stovnað eftir ósigurin í Seks daga-krígnum í 1967. Tá hertók Ísrael Gasa, Vestara Áarbakka, Golan Heyggjarnar og eysturpartin av Jerusalem. PLO var at byrja við ein vápna mótstøðurørsla, ið hevði sum mál at berjast ímóti hersetingin og gera alt Palestina "frælst". Ovastin hjá PLO var frá byrjan av Yassar Arafat.

Hugsjónin hjá fylkingini var um hesa tíðina vinstravend og átrúnaður var skildur frá hugsjónini. Allýsta málið var at stovna eitt fólkaræðisligt, verðsligt og sosialistiskt Palestina har fólk úr øllum átrúnaðum kundu búleikast. Geografist var talan um alt økið, tvs. eisini Ísrael innanfyri markið, sum tað var áðrenn 1967.

Men, sum tíðin leið varð hendan hugsjónin broytt og somuleiðis varð fylkingin umskipað av tilburðum og kreftum í arabiska heiminum – í somu støðu koma aðrar leiðandi stjórnir í arabiska heiminum.

### Skifti í hugsjónum

Í 1970unum og 1980unum fingu tær átrúnaðarligu, politisku rørslurnar luft undir veingirnar. Islam gjørdist í alt størri mun ein veruleiki í politiska landslagnum. Hetta sæst týðuliga í stovnanini av HAMAS í 1988, sum nú í januar 2006 bleiv ein fólkavald stýrandi eind. Tapandi flokkurin í januar var Fatah, sum umboðaði høvuðspartin av PLO.

Um somu tíð, sum 80ini liðu, bleiv stóra Sovjet Samveldið ein minni stuðul hjá palestinum – hugsjónarliga og fíggjarliga. Hersetingini av Afganistan millum annað gjørdi sambandið veikari. PLO førkaði seg hugsjónarliga nærri eini tjóðskapar- og islamsinnaðari støðu, og samstundis vórðu teir taktiskt meiri sinnaðir at laga seg eftir USA, sum Ísrael søguliga altíð hevur havt tætt samstarv við. Í 1989 góðtóku Arafat og PLO rættin hjá Ísrael at vera til. Teir søgdu seg vera tilreiðar at liva saman við ísraelska statinum við útgangsstøði í ST samtyktini 242, ið heitir á Ísrael um at taka seg aftur úr teimum hersettu økjunum frá 1967. Men í 1990 vælsignaðu Arafat og PLO harðrendu ákærurnar frá Saddam Hussein og iraksku hersetingina av Kuveit. Hetta varð, sammett við avgerðina í 1989, ein kúvending. Arafat valdi tapandi partin og fekk soleiðis sett Saudi Arabia, ein stuðul í altjóða hernaðarligu samgonguni, og PLO í eina sera óhepna støðu.

### Men hvør situr við valdið í Palestinska sjálvstýrisøkinum?

Í 1994 í eini svartari limosin kom Yasser Arafat til høvuðssæti sítt í Ramallah. Við honum komu hermenn og embætisfólk. Her byrjaði palestinska sjálvstýrið. Palestinsku myndugleikarnir hava rátt yvir Gasa og Vestara Áarbakka. Stýrið hevur verið merkt av lítið fólkaræðisligum mannagongdum. Umstøðurnar hava ikki verið tær bestu til at reka politik og hava trygdarviðurskifti uttan iva staðið ovast á breddanum hjá myndugleikunum. Í 1996 herjaðu Hamas og Islamiskt Jihad á Ísrael við fleiri sjálvmorðsbumbuatsóknum. Hetta sigur eitt sindur um spjaðingina av valdinum í lítla palestinska økinum.

Ta seinastu tíðina hevur innanhýsisstríðið millum báðar teir leiðandi flokkarnar harðna. Meiri enn 20 palestinar eru dripnir í hesum stríði, tær seinastu vikurnar. Fólkaherarnir hjá báðum flokkunum hava kappast um at vísa seg úti á gøtuni. T.d. gingu umleið 100 vápnaðir fatahhermenn inn í parlamentið og vístu sína vanvirðing fyri teimum fólkavaldu. Fyrst í juni løgdu Hamas-hermenn á palestinsku tjóðarsjónvarpsstøðina í Gasa. Fatah-rørslan við oddamanninum og forsetanum Abbas hevur yvirvág í umboðanini í fjølmiðlunum. Støðan er soleiðis ørkymlandi og hættislig við fleiri vápnaðum lítlum fylkingum,